Tjóðveldisflokkurin

Hildur Patursson:

Vit skulu gera íløgur í útbúgvingar og í arbeiðsroyndir

Roynt verður at ræða føroyskan ungdóm við tí, at fáa vit sjálvstýri, so verða vit avbyrgd og sleppa ikki av landinum at búgva okkum út. Tað er tvætl.

Sleppa vit sjálv at ráða, liggur heimurin víðopin fyri okkum. Spyrji bara íslendingar. Teir vita, hvønn týdning tað hevur havt fyri samfelagsmenningina, at teir tóku sjálvstýri fyri meira enn eini hálvari øld síðani.

Tað er neyðugt at fáa eitt gott og breitt grundarlag undir samfelagsmenningina. Tí mugu vit skapa møguleikar fyri fjølbroyttum útbúgvingum og fjølbroyttum arbeiðsroyndum. Vit mugu út um landoddarnar, og vit mugu gera okkum greitt, at heimurin steðgar ikki við danska markið. Men soleiðis er heimføðisliga útbúgvingarmynstur føroyinga í dag, stýrt av danska útbúgvingarstuðlinum.

Soleiðis nýtist tað ikki at vera. Grannar okkara fyri vestan, íslendingar, hava góðar avtalur við lærustovnar kring allan heimin. Við samstarvsavtalum við lærustovnar í nógvum londum kunnu íslendingar ókeypis, ella fyri ein rímuligan pening, koma inn á teirra lærustovnar og somu sømdir fáa útlendskir studentar í Íslandi. Tílíkar avtalur eru víða um millum fræls lond.

Hesir møguleikar hava givið tí íslendska samfelagnum stóran íblástur, tá tey lesandi koma aftur til Íslands við ymiskum sjónarmiðum frá ymiskum lærustovnum. Hetta ger teirra samfelag ríkari, og tað sæst aftur í so mongum, ikki minst á mentanarliga økinum. Íslendskir tónleikarar, íslendsk leiklistafólk, íslendsk myndlistafólk, íslendskir tøkningar, íslendskir rithøvundar og íslendsk vinnufólk, fáa lærdóm og arbeiðsroyndir um allan heim.

Og hvussu menna íslendingar handilssambandið við umheimin? Fyrst av øllum



gjøgnum tær royndir og tey persónligu sambond, teir gera sær sum heimsborgarar.

Íslendingar eru heimavandir úti í alheimssamfelagnum, bæði beinleiðis og óbeinleiðis gjøgnum nýggju tøknifrøðiligu møguleikarnar, sum teldusamband og nútíðin gevur. Hetta hevur verið ein náttúrlig gongd í Íslandi, tí samskiftið við umheimin hevur kravt tað. Hetta er ein náturligur partur av teirra lærdómi, tí teir eru ikki farnir um garðin, har hann er lægstur.

Vit føroyingar hava eina stóra fordíng, tí so gott sum allir føroyingar velja tann lættara vegin og fáa sína útbúgving í Danmark. Av hesum koma vit alt ov lítið í samband við alheimssamfelagið. Vit verða danskir heimføðingar í Føroyum.

. Tjóðveldisflokkurin vil syrgja fyri, at okkara ungdómur fær fjølbroyttar útbúgvingmøguleikar og møguleikar at gera sær arbeiðsroyndir víða um heimin. Stuðulsstovnurin má fáa rúmari ræsur at virka undir.

Hetta hevði loyst tær kreftir í okkum, sum høvdu dugað at nýtt allar teir fjølbroyttu møguleikar, sum til eru í hesum landi og hesum samfelag, men sum nú liggja í dvala, tí koddin, heimastýrið og ríkisfelagsskapurin skugga fyri huganum og byrgja okkum inni á donskum heimabeiti.

Við tjóðveldisflokkinum út í alheimssamfelagið.

Hildur Patursson,
valevni
Tjóðveldisfloksins

Samstarv millum vinnuna og tað almenna



Skal samfelagnum vera lív lagað má grundarlagið undir vinnulívinum vera at tað hevur tryggar umstøður at virka undir, sum ikki eru heftar at stuttskygnum vinnulívspolitikki hjá skiftandi landsstýrum.

Í Føroyum er neyðugt at allar resursir verða gagnnýttar til fulnar. Tó so at vinnan má og skal skipast í tráð við marknaðarkreftirnar. Leikluturin hjá tí almenna skal tí eisini vera at tryggja samstarv millum ta fakligu vitan vit hava í Føroyum og vinnulívið. Á tí almenna økinum, á stovnum, vinnuskúlum og á fróðskaparsetrinum er hópur av starvsfólki, sum sita inni við stórari vitan og royndum. Um vinnan fær atgongd til hesa vitan og royndir, kann okkara kappingarføri betrast munandi.

Netverk

Í Føroyum er ein rúgva av smáum virkjum, sum vegna avmarkaða støddd og orku ikki megna nógv annað enn at klára til dagin og vegin. Orkan til vørumenning og langtíðarætlanir er tí ógvuliga avmarkað.

Vit hava dugnalig fólk á nærum øllum økjum, t.d. design, verkfrøði, framleiðslu, handil og søla. Tað ræður um at samskipa hesar kreftir, og Føroyar eru uppá nógvar mátar eitt sera vælegnað samfelag til at menna nýggjar vørur í og møguleikarnir fyri fjøltáttaðari vinnu góðir.

Tað almenna eigur at stimbra vinnuna at skipa seg í netverk, ið skapa møguleikar fyri samstarvi bæði tvørturum ymiskar vinnugreinir og í somu vinnugrein.

Men tað er ikki ein almenn uppgáva at skapa lønsemi í vinnulívinum. Tað er uppgávan hjá vinnuni sjálvari. Tað almenna skal fyrst og fremst tryggja vinnuni stabilar karmar at virka undir, og atgongd til altjóða marknaðir gjøgnum uttanríkistænastu og handilssáttmálar.

Hildur Eyðunsdóttir,
valevni
Tjóðveldisfloksins

Vinnulívið/vinnulívsmenn

Tað er tíverri ein alt ov stórur partur av fólki okkara, sum trýr útsøgnum um, at Fólkaflokkurin er einasti flokkur, sum er góður við vinnulívið og vinnulívsmenn(fólk)okkara. Men í veruleikanum er flokkurin hvørki góður við vinnuna ella nakran annan, teir lívga bert teimum, sum eru til reiða at stevna aftur í 80´árini við bindi fyri eygunum og proppum í oyrunum. Ábyrgdarleysi parturin av vinnulívsmonnunum fara gleiðbeintir aftaná, og so tey, sum verða lokkað av herrópum, tómum lyftum. Umframt hava fólkafloksmenn spælt ábyrgdarleyst spæl sum jólamenn við almennum pengum bæði á vetri og sumri.

Sig eina lygn

Leggur tú tær í geyma, so varnast tú skjótt, at fólkafloksmenn siga tað sama um aftur og um aftur. Teir siga seg hava fingið landið aftur á føtur, men gloyma at siga, at teir stungu av, tá á stóð. Og at teir komu umborðaftur, tá veðrið var blíðkað aftur. At óvanliga góður fiskiskapur, lág renta og vónir um oljuvinnu høvdu fingið gongd á aftur, siga teir einki um.

Teir siga, at einasta gongda búskaparliga leið er ein lækking av kostnaðarstøðinum. Teir siga, at tað, ein missir í lønini, fær ein aftur í minni skatti. Teir siga einki um, hvar landskassin skal fáa sínar inntøkur. Og teir siga einki um, hvat er til at taka, næstu ferð á stendur. Skal kostnaðarstøðið minkast enn einaferð, og so enn einaferð...? Skulu vit arbeiða fyri 5,50 kr. um tíman ár 2010?

Fólkaflokkurin fekk lokkað sínar samgonguflokkar til at í besta jólamannastíli at geva fiskimonnum skattalætta. Tað var kanska ikki so torført at lokka, tí onkur samgongufelagi hevði síni privatu áhugamál í hesi játtan. Men hesin famøsi skattalætti var ikki annað enn at lívga teimum sjómonnum, sum tjena nógv og reiðarunum. Teir fiskimenn, sum veruliga tørva stuðul, fáa einki burturúr, og samstundis vóru aðrir vinnubólkar við skerdan lut.

Nei, roknistykkið hjá fólkafloksmonnum verður ongantíð liðugtroknað, og tað er heldur ikki ætlan teirra, tí teirra politiski grundvøllur er ikki annað enn klisjejir, plastikk og butter-



flies. Teir hava tó lært ávísar politiskar reglur, og ein teirra er, at sigur tú eina lygn nóg ofta, so trúgva fólk tær.

Arbeiðssemi og hegni

Tað eru tíbetur nógv her á landi, sum kenna treytirnar og liva sambært teimum. Tey vita, at skal vinnulív, land og fólk hórða undan, so er neyðugt at taka tøk, vísa hegni og hugflog. Og tað eru ikki bert skilagóðir vinnulívsmenn, sum kenna hesar treytir. Nei, so sanniliga eisini verka- og fiski- og starvsmenn, sum við sínum dagliga strevi eru ein avgerandi partur av grundvølli okkara. Og Tjóðveldisflokkurin fer altíð at royna at geva hesum partinum av arbeiðs- og vinnulívinum tær bestu arbeiðs- og liviumstøður. Hetta fyri at vinnulívið kann gerast ført fyri at gjalda sín part av samfelagsrakstrinum. Hetta fyri at tryggja øllum eitt sunt og vælvirkandi vælferðarsamfelag.

Vit kunnu eisini orða tað nakað soleiðis: Fólkaflokkurin er góður við vinnulívið við tí endamáli at lívga ábyrgdarleysum vinnulívsmonnum, sum vilja sleppa við aftur í 80´ini.

Tjóðveldisflokkurin er góður við vinnulívið við tí endamáli, at ábyrgdarfullir vinnulívsmenn skulu fáa bestu møguleikar at virka undir og saman við øðrum gera vinnulívið ført fyri at vera við til at gjalda fyri samfelagsraksturin.

Eftir er so at vóna, at fólk duga at skilja og virðismeta hesa sannroynd, at tey duga at síggja munin, og stuðla Tjóðveldisflokkinum í at útinna politisku ætlaninar og harvið røkka sínum máli.

Finnur Helmsdal,
tjóðveldismaður



Minnist til haldaragjaldið!